gult cyan magenta svart



H71-Kyndil (24-30 (9-12)

# Kyndil greiddi skylduna

**Bjarni Wardum var fram um liðfelagarnar maðurin, sum sunnudagin tryggjaði Kyndli sigurin á grannunum úr H71 í einum dysti, sum ikki verður mintur fyri tað stóra undirhaldsvirði**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eftir stórtapið fyri VÍF fyrr í vikuni skuldi Kyndil sunnudagin royna at reisa seg aftur, tá teir vóru á útivølli móti H71.

Uppgávan átti at verið yvirkomulig hjá Kyndilsliðnum, um metast skal eftir stigatalvuni, men alt ov lætt mundu teir grønu tó ikki taka upp á uppgávuna. Júst í seinasta dystinum móti H71 mátti Kyndil óvæntað boyggja seg. Eitt tap, sum í fyrstu atløgu merkir, at teir ikki longur einsamallir kunu gera av, hvørt teir skulu fanga VÍF aftur á stigatalvuni.

## Dølsk byrjan

Fyrstu løtuna var tó ikki nógv, sum bendi á, at Kyndil veruliga ætlaði at hevna seg inn á hoyvíkingar fyri keðiliga stigamissin í grundspælinum. Spælið gekk sera seint hjá liðunum báðum, og hetta viðførdi eisini, at uppgávurnar hjá liðunum báðum í verjupartinum ikki var serliga stór.

Hagtalsliga sást eisini, at tað gingu á leið tveir minuttir millum hvørt málið hesa fyrstu løtuna, og hetta sigur eisini eitt sindur um, at tað var so sum so við undirhaldsvirðinum hesa løtuna.

## Bjarni gekk á odda

Tí syndrinum av undirhaldi, sum var í dystinum, stóð Bjarni Wardum at kalla einsamallur fyri, og tað skuldi eisini vísa seg, at hansara leiklutur skuldi hava avgerandi týdning fyri dystin. Hvat skotum viðvíkti hevði hann ein av sínum heilt góðu døgum. Skot úr ymsum vinklum og ymsum hæddum høvdu nærum øll beina kós móti meskunum, og harumframt gav hann í fleiri førum dømi um, hví hann á landsliðnum verður mettur sum arvtakarin hjá Inga Olsen. Freku brotskøst hansara eru vit nú skjótt eisini von við at síggja, og heldur ikki í hesum sveik hann álitið, men sendi øll trygt í kassan, og í einum tveimum førum við hasi stuttligu skrúvuni á.

Bjarni var tó sjálvandi ikki einsamallur á vøllinum, men liðfelagar hansraa tóktist nærum allir at fáa óvanliga lítið burturúr.

Janus Einar hevði fleiri góðar møguleikar, sum einki kastaðu av sær, Uni Wardum og Jónleif Sólsker vóru í løtum óvanliga passivir. Tá soleiðis er, er sera trupult at spæla verjuna tunna, og tí var tað eisini ógvuliga avmarkað, hvat vengurnir fingu at arbeiða við.

## Viljin restaði í

At hoyvíkingar ikki megnaðu at revsa slaka kyndilsliðið harðari, mugu teir fyrst og fremst sjálvir taka sær ábyrgdina av.



*Hóast munurin ongantíð var hin heilt stóri, so var tað hinvegin heldur ikki líkt til, at H71 skuldi megna at koppa Kyndli sunnudagin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Spæl teirra var ógvuliga átøkt tí hjá mótstøðuliðnum, við seinum flytingum, sum til tíðir vórðu kryddaðar við rótutum gjøgnumbrotsroyndum. Einmansherurin hjá Halgiri tóktist heldur ikki at vera rættiliga í essinum. Kanska var alt hetta ein avleðing av, at liðini hava havt eina óvanliga langa vetrarfrí, men tað kann so ikki vera einasta frágreiðingin.

Hugburðurin at stríðast og berjast fyri eini felags søk tóktist heldur ikki at vera til staðar. Júst hesin stríðsviljin var annars hornasteinurin í teimum sigrum, sum hoyvíkingarnir hava vunnið á ovaru støddu liðunum, og hann verður eisini neyðugur, um hvítklæddu menninir hava ætlanir um at endurtaka nakrar av hesum sigrunum. Olaf royndi at stríðast fyri seg í verjupartinum, men einsamallur megnaði hann ikki at koppa kyndilsliðnum.

## Gekk sum væntað

Tá omanfyristandandi útsagnir um leikferð og hugburð verða tiknar við, so lagaði dysturin seg á leið soleiðis, sum roknast kundi við.

Kyndil megnaði hampuliga tíðliga at leggja seg fram um vertirnar, og uttan at talan nakran tíð gjørdist um polerað hondbóltsspæl, so tóktust teir alla tíðina at hava tamarhald á tí mesta, sum fyrifórst úti á vøllinum.

Sum nevnt var tað serliga Bjarni, ið gjørdi um seg, máltal hansara fyri dystin boðar eisini frá, at avrik hansara meira enn nakað annað var tað, sum avgjørdi dystin.

Eftir at Kyndil hevði eina tvey mála stóra leiðslu í steðginum, nýttu teir fyrstu løtuna í seinna hálvleiki til at økja um hesa, og seinni hálvleikur varð tí í langum løtum ein oyðimarkargongd, har leikararnir mest av øllum tóktust at bíða eftir, nær dómarin fór at bríksla dystin av. Onkuntíð togaði H71 munin niður í eini tvey-trý mál, men hvørja ferð svaraðu teir grønu aftur, og eingin mundi vera í iva um, at dysturin hevði funnið rætta vinnaran, tá seinasta brískliið ljóðaði.

Hjá hoyvíkingunum var tað serliga Anfinnur N. Debes, sum tóktist at hava eitt gott tak á fyrrverandi liðfelaganum í kyndilsmálinum, meðan Halgir als ikki slapp at hava sama dominerandi leiklut, sum hann so ofta fyrr hevur havt. Fyrst og fremst var hetta avleiðingin av lágu leikferðini, tí tað eydnaðist nærum ongantíð at fáa spælið at koyra runt, soleiðis at umstøðurnar til skotini hjá Halgiri vórðu størri.

## Broytt hoyvíkslið

Annars var merkisvert við dystinum, at liðið hjá H71 er nakað broytt, nú farið verður undir endaspælið.

Agnar Højgaard var fyri fyrstu ferð at síggja á liðnum, og skálamaðurin fer ivaleyst at vera teimum ein dyggur stuðul, tá hann er samanspældur við nýggju liðfelagarnar. Serliga í verjupartinum er styrki hansara eyðsýnd. Hinvegin hava hoyvíkingarnir mist Stefan Dorofte, sum hóast hann var skaddur stóran part av grundspælinum, til tíðir sýndi at hann hevði sera góð hondbóltsevni.

Eisini fer H71 at verða rakt av fótbóltskappingini, nú venjingarnar hjá ymsu liðunum av álvara byrja, og eitt nú verður Tróndur Vatnhamar ikki við meira í ár, eins og spælarar sum Jákup á Borg og Allan Mørkøre ikki longur kunnu roknast sum tøkir, um tað stendur á at fáa fólk. Spurningurin er so, um hetta eisini fer at raka Hall Danielsen, sum hevur sera týdningarmiklan leiklut á liðnum.

Hoyvíkingar kunnu illa vera allar hesar leikarar fyri uttan, meðan kappingarneytarnir í niðaru hálvu av stigatalvuni allir tykjast at ætla at styrkja um liðið. Enn er so langt ífrá sloppið hjá teimum, og komandi dystirnir fara helst at geva eina ábending um, hvat vit skulu rokna við at síggja frá teirra síðu restina av kappingarárinum. Skulu teir blanda seg longur upp í toppin, er neyðugt við avrikum, sum eru væl meira støðug, enn tey hava verið higartil., og í øllum førum skulu avrikini vera betri, enn tey vóru sunnudagin.

## Óstøðugt

Fyri Kyndil viðførdi sigurin sjálvsagt fyrst og fremst, at liðið fekk tvey stig, sum teir so avgjørt hava fyri neyðini í stríðnum í oddinum. Har munnu teir langt síðandi hava slept vónini um at fanga vestmenningar aftur, men hinvegin er sera týdningarmikið hjá teimum, at teir ikki missa fleiri óneyðug stig í kapprenningini við strandingar um silvurmerkini.

Tað átti heldur ikki at verið neyðugt hjá Kyndli at tveitt fleiri av slíkum stigum burtur, tí seinna partin av grundspælinum sýndu kyndilsmenn fleiri ferðir, at teir so avgjørt megna at spæla vakran hondbólt. Liðið telir fleiri ungar evnaríkar leikarar, og saman við teimum meira royndu er talan um eina blanding, sum veruliga kann røkka langt komandi tíðina.

Fyrsta kravið verður tó at fáa tann so týdningarmikla stabilitetin inn á liðið, og megna teir tað, er helst einki at ivast í, at grøna havnarliðið er fremsta boðiði til silvurmerkini, tá vit fara at nærkast endanum av kappingarárinum.

## Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
H71: Anfinn N. Debes 8, Halgir Dahl Olesen 6(1), Hallur Danielsen 5(1), Olaf Vestergaard 3, Rebe Dahl Olesen 2(1)
Kyndil: Bjarni Wardum 12(5), Jónleif Sólsker 5(1), Høgni Klein 4, Heini Bendtsen 3, Uni Wardum 2, Hans Áki Dal Christiansen 2, Regin M. Petersen 1, Janus Einar Sørensen 1
Brotskøst: H716, Kyndil 6
Útvísingar: H71 1, Kyndil 4
Dómarar úr Stjørnuni: Geir Wardum og Carsten Andersen. Gott at síggja at dómarar taka floytuna fram aftur, tí dómaramangur er kanska ein hin størsti trupulleikin hjá hondbóltinum í dag. Høvdu sjálvandi nakrar feildómar, men í mun til at talan var um fyrsta rættiliga dystin í ár, vóru hesir als ikki so nógvir í tali, sum ein kundi verið bangin um.



*Agnar Højgaard er nú at síggja á H71-liðnum, og ikki minst í verjupartinum man hann fara at styrkja um hoyvíkshópin. Her roynir hann at skerma Regin Petersen hjá Kyndli*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

gult cyan magenta svart



Kyndil-Sóljan 27-19 (14-9)

# Tannleyst á Hálsi

**Í einum sera tannleysum dysti eydnaðist Kyndli at basa Sóljuni, og harvið sluppu tær sær enn eitt petti burtur frá niðastu liðunum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Besta kvinnuliðið hjá Kyndli hevur eftir øllum at døma havt eitt alt annað enn lætt kappingarár. Av ymsum orsøkum hevur leikaraskiftið verið óvanliga stórt, og aftur undan hesum dystinum vóru onkrar broytingar at síggja.

Sostatt var Jórun Ludvig, sum er burturstødd í lestrarørdinum ikki boðsend til hendan dystin, men har afturímóti var eitt annað gamalt andlit at síggja á liðnum.

Beinta Sørensen hevur ikki spælt hondbólt, síðani hon fyri knøppum ári síðani var á vinnandi liðnum í steypafinaluni, men nú var heima á vitajn, og hon hevði so játtað at spælt við í hesum dystinum. Sum so ikki nakað ókent fyribrigdi, at lið fáa hjálp frá útisetum, men at Beinta ikki hevur spælt í nærum eitt ár, sigur eitt sindur um ringu støðuna hjá Kyndli. Ikki tí, hon stóð seg eins væl og flestu liðfelagarnir, og tað má eisini metast sum merkisvert.

## Sóljan hótti

Hóast støðan sostatt ikki var tann allarbesat undan dystinum, so mundu vónirnar hjá Kyndli um stig tó ikki vera heilt ongar. Sóljan hevði higartil í ár bert tikið stig frá Tjaldri, og ivaleyst ætlaðu kyndilskvinnurnar ikki, at tær skuldu standa næstar í røðini.

At byrja við bendi tó á, at vágagenturnar møguliga kundu gera ein vørr, tí hóast tær enn ikki hava vant seg rættiliga við fyrstudeildarhondbólt, so stríddust tær fyri sakini, og fyrsta partin av dystinum vóru tær eisini omaná.

Hetta tók tó eina vend, tá fyrri hálvleikur var á leið hálvrunnin. Tá byrjaði brádliga at liggja betri fyri hjá Kyndli, og serliga í verjupartinum fingu tær nú fatur á nógv meira. Tá mótstøðuliðið so eisini framdi fleiri tekniskar villu hesa løtuna,

Á máltalvuni hevði skiftið í spælinum eisini við sær, at 4-7 broyttist til 14-9, og so hevði kyndilsliðið mest sum tryggjað sær sigurin.

## Tríbýtt kapping

Seinni hálvleikur var í spæli ikki stórt øðrvísi enn fyrri. Eina løtu tóku tær á heimaliðnum kanska heldur lætt upp á uppgávuna, og hetta viðførdi, at Sóljan kundi toga nakað inn aftur. Eitt skifti var munurin niðri á fýra málum, men so dró Kyndil aftur frá, og í vanda var sigurin ongantíð.

Úrslitið og spælið boðaðu eisini frá, at hóast Kyndil er nógv viknað síðani tær fyri tveimum árum síðani vunnu gullmerkini, so er framvegis stórt glopp niður til niðastu liðini. Hetta má metast sum stórt spell, tí sum er, hevur kappingin lagað seg í tríggjar bólkar.



*Beinta Sørensen hevur ikki spælt hondbólt í nærum eitt ár, men sunnudagin hevði hon aftur fingið sær harpiks á fingrarnar*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Trý tey ovastu stríðast um heiðursmerkini, tó at VÍF tykist at vera ein flokk omanfyri hini. Tey bæði niðastu stríðast móti niðurflytingarvandanum, meðan Neistin og Kyndil í miðjni einki sum helst hava at spæla fyri. Tá kann tað gerast tungt at motivera seg til at spæla yvirhøvur, og kanska var tað hetta, sum hendi hjá Kyndli sunnudagin.

So væl, sum tær kortini sluppu sunnudagin, sleppa tær tó neyvan móti øðrum liðum, og er tað allar helst hetta, sum leikandi kyndilsvenjarin fyrst fer at leggja seg eftir at broyta komandi mánaðirnar.

## Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
Kyndil: Lotte Sørensen 8(4), Erla Smith 4, Kristbjørg Petersen 3, Anita Kjærbo 3, Jensia Petersen 3, Beinta Sørensen 2, Simona Fjallstein 2, Herborg Joensen 1, Ann Hansen 1
Sóljan: Hertha Simonbsen 6, Marjun Jørgensen 5(3), Sólja Nielsen 4, Heidi M. Akselsen 2, Heidi Haraldsen 1, Jóhanna í Horni 1
Brotskøst: Kyndil 4, Sóljan 6
Útvísingar: Kyndil 3, Sóljan 1
Dómarar úr Stjørnuni: Geir Wardum og Carsten Andersen. Høvdu eina sera yvirkomuliga uppgávu, og við hvørt var eisini líkt til, at dómararnir høvdu hug at sova eitt sindur.




FAROE SEAFOOD

Fiskasølu Samtakið marknaðarførir eitt stórt úrval av fiskavørum í egnum merki til marknaðir í meira enn 30 londum. Høvuðsskrivstovan er í Tórshavn og felagið hevur dótturfeløg í Stóra Bretlandi, Fraklandi og Danmark. Føroya Fiskasøla er størsta útflutningsfelag í Føroyum við einum árligum umsetningi upp á DKK 850 mió. Fiskasølu Samtakið hevur professionel starvsfólk, ið dagliga virka í einum altjóða umhvørvi.

www.faroe.com

Innkeypari

Fiskasølan sóknast eftir fólki til innkeyp av fiskavørum. Í fyrstu atløgu verður talan um innkeyp av feskum vørum, men sum frá líður verður talan um aðrar vørur eisini.

**Starvið**
Starvið fevnir um keyp av virkaðum vørum til beinleiðis sølu ella rávøru til virkingar. Innkeyparin skal - í samstarvi við sølufólk og sølufeløg okkara uttanlands - økja innlitið hjá Fiskasøluni í framleiðsluliðið og rávørumarknaðin.

**Umsøkjarin**
Tað er ein fyrimunur, at tú hevur innlit í rávørumarknaðin og framleiðsluliðið, tvs. fiskastovnar, fiskiskap, uppboðssølu og flakavirki. Tú hevur handilsligar royndir, er miðvísur, samstarvshugaður, opin fyri avbjóðingum og kann arbeiða sjálvstøðugt. Fiskasølan er eitt altjóða virki og tað er tí ein treyt, at tú dugir væl at orða teg á enskum máli. Avbjóðingarnar í starvinum kunnu gerast av slíkum slagi, at fólk við leiðsluroyndum hava fyrimun.

**Vit bjóða**
Eitt avbjóðandi og mennandi starv í einum altjóða virki, har tú skal luttaka í menningini av eini innkeyps- og framleiðsludeild. Deildin skal gerast grundarlag undir einum styrktum søluarbeiði hjá dótturfeløgum okkara uttanlands.

**Umsóknin**
Umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving verður at senda til Starvsfólkadeildina hjá Fiskasøluni í seinasta lagi mánadagin, hin 12. februar 2001. Upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Rógva Reinert, Projekt & Tekn. leiðara, tel. 345 345. Fyrispurningar og umsóknir verða viðgjørd í trúnaði.

Føroya Fiskasøla P/F • P.O. Box 68 • FO-110 Tórshavn • Tel +298 345 345 • Fax +298 345 300 • e-mail: faroe@faroe.com